

Statoil leita fyri 21 milliardir í 2014 – eitt nú í Føroyum

Jan Müller

08.11.2013 - 15:04

Oljan.fo

Tað eru stórar peningaupphæddir, sum verða brúktar til oljuleiting. Statoil hevur júst kunngjørt, at tað fer at brúka 21 milliardir kr. til nýggja oljuleiting í 2014. Ein partur av hesum milliardunum fer at verða brúktur í Føroyum.

Sum skilst fer Statoil at bora millum 50-60 brunnar um allan heim næsta ár. 20-25 av hesum brunnum vera í Norra. Hetta eru fimm-tíggju færri enn í ár, har boraðir verða 30 brunnar á norskum øki. Kortini verður mett, at Statoil fer at brúka nógva orku uppá at finna olju og gass á nýggjum leiðum, her serstakliga í Barentshavinum.

Fyri føroyingar eru tað serstakliga tveir av brunnunum hjá Statoil næsta ár, sum hava

okkara áhuga. Tað eru teir báðir, sum Statoil fer at bora í Føroyum. Hesir fara at kosta millum eina og tvær mia. kr. at bora. Uttanfyri Norra er eisini stórur áhugi fyri brunnum í Kanada og Afrika.

Statoil leggur seg annars serstakliga eftir at bora leitibrunnar í Norskahavinum og Barentshavinum, har mett verður, at møguleikar eru at finna olju og gass. Higartil eru boraðir 106 brunnar í Barentshavinum. Ì Norðsjónum eru boraðir 1177 brunnar. So langt er á mál, tá tað ræður um nýggju økini har norðuri.

Statoil hevur sagt frá, at tað vónar, at brunnar í 2013 og 2014 kunnu lata upp fyri heilt nýggjum økjum á norska landgrunninum. Hetta merkir, at tað har norðuri fara at verða boraðir fleiri brunnar komandi ár enn í ár.
Hetta er sjálvandi nakað, sum dámar umhvørvisfeløgum illa, tí tey ynskja als onga boring í Barentshavinum.

Daniel Tuppen, leitistjórin hjá Statoil fyri Norskehavið og Barentshavið, roynir tó at sissa umhvørvisfólkini.

“Statoil hevur verið fyristøðufelag ella partnari í 95 av brunnunum, sum eru boraðir í Barentshavinum. Hetta hevur givið okkum nógvar royndir og vitan á økinum. Vit hava flutt okkum stigvíst longur norðureftir, gjørt drúgvar umhvørvisgreiningar og gjørt góðar tilbúgvingarætlanir.”

Statoil hevur í umbúnað at bora í tí norðasta partinum av leitiøkjunum í Barentshavinum komandi summar, nevnt Hoop. Her hevur eysturríkska oljufelagið OMV sum tað fyrsta nakrantíð – tó saman við Statoil - rakt við olju og gass. Tuppen heldur ikki, at hetta verður nakar umhvørvistrupulleiki, tó at umhvørvisfólk oo. hava ávarað móti at fara undir at bora har, tí ov nógvar óvissur eru so langt norðuri.

Ein av stóru avbjóðingunum hjá oljufeløgunum, sum ætla at bora har norðuri í Barentshavinum, er langi teinurin til lands. Í hesum sambandi hevur verið tosað um at brúka Bjarnoynna til tyrlumiðstøð. Tosað verður eisini um at fáa nýtt slag av flótibúnum, sum kunnu gera, at fólk kunnu liggja longri í sjónum. Eisini er nevnt, at eitt skip skal liggja í økinum at vera tilreiðar at veita hjálp, skuldi nakað hent, eitt nú dálking, meðan borað verður.

Tuppen frá Statoil leggur dent á, at farið verður ikki longur við arbeiðinum í Arktis, enn tøknin loyvir.

Statoil hevur annars býtt upp virksemið í Arktis í tríggjar ymsar bólkar. Leitivirksemi í Barentshavinum finst í tí økinum, sum verður skrásett sum "Workable Arctic" – umráði, har til ber at arbeiða við dagsins tøkni. Síðani er ein bólkur, ið verður nevndur "Stretch Arctic" við Canada og seinasti bólkurin er "Extreme Arctic" í Eystur-Grønlandi. Alt eftir hvussu tøknin er ment til at arbeiða í hesum økjum fer Statoil at leggja sína strategi.

Mynd
Gro G. Haatvedt, leitistjóri hjá Statoil á norska landgrunninum.

Keldur
Statoil
Aftenbladet
E24